# Lítið nýtt undir sólini

**Politiski boðskapurin frá danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, og forkvinnuni í danska Javnaðarflokkinum, Helle Thorning Schmidt, var ikki heilt óvæntað ein endurtøka av tí, vit hava hoyrt seinastu árini**

STUDENTADAGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*



*Tey ungu føroysku lesandi hildu seg ikki aftur við at seta forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen spurningar* *Myndir: Símun J. Hansen*

**Christiansborg:** Vit fegnast um nýggju uttanríkis- og heimildarlógina. Føroyingar og grønlendingar gera sjálvir av nær londini fáa sjálvsstýrið. Ynskja Føroyar og Grønland at fara úr ríkisfelagsskapinum, standa vit sjálvandi ikki í vegin. Vit ynskja at varðveita ríkisfelagsskapin, tí søguliga er so nógv, sum knýtir føroyingar, grønlendingar og danir saman.

Velja føroyingar og grønlendingar at fara úr ríkisfelagskapinum, so verða tit noydd at taka avleiðingarnar av tí.

Uppleggingini hjá danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen og forkvinnuni í Javnaðarflokkinum, Helle Thorning Schmidt, á studentadegnum vóru ómetaliga lík. Ikki heilt óvæntað var teirra politiski boðskapur ein endurtøka av tí, sum føroyingar og grønlendingar hava lagt oyru til seinastu árini.

Hvørki Anders Fogh Rasmussen ella Helle Thorning Schmidt høvdu stundir at steðga á studentadegnum longri enn 15 minuttir og hetta var eitt sindur spell, tí tey vóru uttan iva forkunnugastu nøvnini, ið Norðuratlantsbólkurin kundi borðreiða fyri teimum lesandi úr Føroyum og Grønlandi á Christiansborg fríggjadagin.

Hinvegin var tað stuttligt at síggja Anders Fogh Rasmussen tosa óformelt við fleiri grønlendsk og føroysk lesandi undir matarsteðginum á studentadegnum. Hjá mongum kann tað óivað tykjast møtimikið at standa yvir av einum forsætisráðharra og seta honum spurningar, men tað tóktist als ikki at darva fleiri lesandi, tí tey hildu seg ikki aftur við spurningum til forsætisráðharran, og Anders Fogh Rasmussen royndi at svara eftir førimuni.



*Helle Thorning Schmidt, forkvinna í danska Javnaðarflokkinum, var ein av gestarøðarunum*



*Tey ungu lesandi vóru ófør at spyrja donsku politikararnar*



*Lítli Høgni var ein av yngstu luttakrunum á Christiansborg um vikuskiftið. Hann eltir sostætt slóðina hjá langabbanum, Jákup Lindenskov, sum hevði sína dagligu gongd har í fleiri ár*

## Skelkandi lítil vitan



STUDENTADAGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Christiansborg:** Danski undirvísingarmálaráðharrin, Bertel Haarder, er alt annað enn errin av vantandi vitanini hjá donskum skúlanæmingum um Føroyar og Grønland. Á studentadegnum fríggjadegnum á Christiansborg greiddi royndi ráðharrin frá, at hann herfyri kom á eina kanning, sum viðgjørdi vitanina hjá donskum skúlanæmingum um Grønland og Føroyar. Úrslitið var rættiliga skelkandi, tí millum annað kom undan kavi, at fleiri næmingar ikki vistu, hvar Føroyar og Grønland lógu landafrøðiliga.

– Vit kunnu snøgt sagt ikki loyva okkum at vita so lítið um føroysk og grønlendsk viðurskifti. Tit lesandi hava møguliga nøkur góð hugskot, hvussu eg kann betra vitanina hjá donskum næmingum um ávikavist Føroyar og Grønland?

Bertel Haarder hevði kortini einki greitt boð um, hvussu vitanin hjá donskum skúlanæmingum kundi betrast, og spurdi retoriskt út í salin um nøkur føroysk ella grønlendsk lesandi høvdu eitt boð upp á tað.

# Føroyanevndin umskipast

**Vinstri, Teir Konservativu og Javnaðarflokkurin taka allir undir við, at Føroyanevndin verður umskipað. Føroysku fólkatingslimirnir Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg eru ósamdir um uppskotið**

FØROYANEVNDIN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Christiansborg:** Seinasta hósdag var fyrsta viðgerð á Fólkatingið av einum uppskoti, ið leggur upp til umskipa Føroyanevndina. Uppskotstillararnir Christian Wedell-Neergaard, Helge Adam Møller, Pia Larsen og Svend Erik Hovmand ynskja við uppskotinum at geva Føroyanevndina størri heimildir, enn hon hevur í dag. Nevndin hevur í verandi líki ikki heimild til at viðgera lógaruppskot, men hetta vilja uppskotstillararnar broyta.

Í viðmerkingum til uppskotið stendur skrivað, at umskipanin av Føroyanevndini er ein natúrlig avleiðing av nýggja uttanríkis- og heimildarlógin, ið gevur Føroyum øktar heimildar á uttanríkisøkinum. Verður uppskotið samtykt lækkar talið av nevndarlimur í Føroyanevndini frá 21 niður í 17.

Undir fyrstu viðgerð hósdagin kom undan kavi, at føroysku fólkatingslimirnir, Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg eru ósamdur um uppskotið. Norðuratlantsbólkurin og Høgni Hoydal ynskja, at føroysk viðurskifti í framtíðini verða viðgjørd sonevndu sjálvsstýrisnevndini, sum í løtuni bert viðger grønlendsk áhugamál í ríkisfelagsskapinum

Annfinn Kallsberg segði seg hinvegin taka undir við uppskotinum hjá Christian Wedell-Neergaard, Helge Adam Møller, Pia Larsen og Svend Erik Hovmand. Framsøgufólkini hjá Vinstra, teimum Konservativu og Javnaðarflokkinum tóku undir við uppskotinum, so tí tykist tað rættiliga sannlíkt, at uppskotið verður samtykt.

Eftir 1.viðgerð hósdagin varð málið koyrt í Udvalget for Forretningsordenen.